Heðin Brú væl vitjaður

Væl umtókta handrita- og bókaframsýningin á Landsbókasavninum í sambandi við, at Heðin Brú hevði verið 100 ár í summar verður standandi til næsta ár

MENTAN
Turið Kjølbro

Handrita- og bókaframsýningin í sambandi við, at Heðin Brú hevði verið 100 ár í summar, er framvegis at síggja á Landsbókasavninum. Nógv fólk vitja framsýningina, og nú er gjørt av at, sýningin verður standandi til 1. februar næsta ár.

Í hesum døgum er eisini ein lítil Heðin Brú-framsýning at síggja í ungmannafelagshúsinum Kelduni í Skálavík. Henda framsýningin er opin til og við sunnudagin 25. november. Opið er frá kl. 19-21.

Seinasta sunnudag varð minnisvarði av Heðini Brú avdúkaður í Skálavík. Hann er reistur á Smiðjugrundini í Innaradali. Gjørt bringumyndina hevur listamaðurin, Fritjof Joensen, sum doyði fyri nógvum árum síðani. Í nýggjari tíð er bringumyndin stoypt í bronsu og sett á stein. Hesum arbeiðinum hevur eitt nú Óli Nielsen, grót-høggari, staðið fyri.

Hátíðarhaldið byrjaði við deknagudstænastu. Tá ið minnisvarðin varð avdúkaður, vórðu nógv góð orð søgd. Linjohn Christiansen, borgarstjóri, segði nøkur orð um skaldið, og somuleiðis Eyðun Viderø, løgtingsmaður, sum avdúkaði varðan.

Tað var upprunaliga dóttir Heðin Brú, sum kom við hugskotinum um at reisa ein varða yvir Heðin Brú í heimbygd hansara. Hesum greiddi Bárður Jákupsson frá undir hátíðarhaldinum. Millum nógvur gestirnar í Skálavík sunnudagin, vóru flestu børnini hjá Heðini Brú.

Seinasta sunnudag varð minnisvarði av Heðini Brú avdúkaður í Skálavík

Mynd: Palli Olsen



STARV

Sosialinum tørvar blaðfólk

Sosialurin fer í nærstum at víðka um virksamheiðin, har dentur verður lagdur á at skriva tíðindi til internetið. Ein alsamt vaksandi partur av tíðindaflutningunum fer um internetið, og fara vit nú at víðka lesarum okkara eina enn betri hansatu á hesum eki við at dagfera tíðindini á internetinum allan dagin.

Utan dugnalig starvsfólk ber ikki til at menna fyritøkuna, og tí hava vit brúk fyri at skja um redaktónina sum skjótast, serstaks at orka verður til at taka sær av tíðindunum á internetinum.

Vit bjóða tar eitt hendingarrikt og fjølbreytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi og livandi redaktión, og tú skeppur at royna tag við alskyns uppgávum.

Umsøkjarar við vælkomandi útbúgving ella journalistiskum reyndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða tag lætt og nøvt á føroyskum, og at tú fylgir vel við í tí, sum hendir og nærist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og finna ferðir um vikuna koma vit á gátuna.

Umsóknir við meguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan leygardagin 1. desembar 2001:

Sosialurin
Postmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at fræsta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt óvist og spannandi arbeiðsplátss. Har starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði ábyrgarmiklar og fjølbreyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

Standið saman ímóti harðskapi

Sunnudagin 25. nov. er altjóða dagur ímóti harðskapi ímóti kvinnum

Rætturin til eitt lív uttan harðskap er eitt krav frá kvinnum um allan heimin. Aftrat at skaða og oyðileggja kvinnuna likamliga og sálarliga, er harðskapur ein forðing fyri, at kvinnur virkið taka lut í samfelagnum. Harðskapur rakar kvinnur um allan heim, í øllum sosialum løgum og uttan mun til útbúgving.

Øll menniskju eru fødd frí og við líka rættindum og vístu. Tí er ein hvørjum ein rætt til at fáa sínar tarvir dekaðar, sum eru mat, klæðir, bústaður, heilsuverk, mentan og ein tryggur og góður umhvørvi. Tí er ein hvørjum ein rætt til at verða frí og at ganga frí av ótta og ótryggi.

Ein av grundarsteinunum í menniskjarættindum er, at